# Góða SøluRás 2001

Eins og undanfarin ár er sølustevnan SøluRásin 2001 fyriskipað av ítróttarfeløgunum á Skála og á Strondum. Tað vil siga, at Skála Ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, Stranda Ítróttarfelag og Ungmannafelagið Strálan standa saman um at fyriskipa hesa stevnuna.

Endamálið við stevnuni er at fáa pening til vega, sum skal nýtast til raksturin hjá hesum fýra feløgunum.

SøluRásirnar, sum hava verið fyriskipaðar seinastu árini, hava verið serstakliga væl eydnaðar. Fleiri enn 30 fyritøkur hava sýnt fram og tey bæði seinastu árini vóru fleiri enn trý túsund atgongumerki seld.

Tí hava vit aftur í ár gjørt okkara ítarsta fyri at øll – bæði framsýnarar og gestir – skulu vera so væl nøgd við stevnuna sum til ber.

Vit fara her at takka øllum framsýnarum, lýsarum, teimum sum undirhalda, teimum vitjandi og øllum tykkum mongu, sum hava hjálpt til at gera tað møguligt at hava eina slíka sølustevnu sum hesa.

Við ynskjum um eina væl vitjaða og góða sølustevnu á SøluRásini 2001. Vælkomin!

**Fyrireikingarnevndin**



## Skála Ítróttarfelag

**Skála Ítróttarfelag sum varð stovnað í 1965, er í dag eitt fótbóltsfelag burturav. Umframt at vera umboðað í øllum yngru deildunum er felagið, fyri fyrstu ferð síðani stovnanina, umboðað í bestu deildini hjá monnum næsta kappingarár.**

**Formaður er Kurt Rasmussen**



## Stranda Ítróttarfelag

**StÍF, sum felagið eitur í dagligari talu, varð stovnað í 1948 og man tí vera eitt av teimum elstu ítróttarfeløgunum í landinum. StÍF er hondbóltsfelag og hevur lið í øllum deildum, bæði hjá kvinnum, monnum, gentum og dreingjum.**

**Formaður er Andrass Danielsen**



## Skála Róðrarfelag

**Skála Róðrarfelag varð stovnað í 1993 og er eitt róðrarfelag burturav. Felagið hevur luttikið í kappróðri við tveimum bátum síðani stovnanina. 5-mannafarinum Svani og 10-mannafarinum Skálabátinum.**

**Formaður er Dan Petersen**



## Strálan

**Ungmannafelagið Strálan varð stovnað í 1989. Felagið hevur tikið lut í kappróðri við 6-mannafarinum Stráluni síðani 1989. Umframt kapprógvingina hevur Strálan eisini badminton á skránni.**

**Formaður er Anfinn Gærdum**










